# Maria gleðir seg til Norðoyastevnu

## 40 ára gamla Maria Olsen frá Árnafirði flutti herfyri heimaní frá fyri fyrstu ferð.

## Hon er nú eitt av búfólkunum á einasta sambýlinum fyri tilkomin menningartarnað í Føroyum

BÚSTOVNUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Tann 25. mars í ár flutti 40 ára gamla Maria Olsen fyri fyrstu ferð út frá foreldrum sínum í Árnafirði.

Orsøkin var, at hon hevði fingið eina íbúð á nýggja sambýlinum fyri tilkomin menningartarnaði í Klaksvík. Hetta er samstundis einasta sambýli av hesum slag, sum finst í Føroyum, og fólk vóru sera spent at vita, hvussu hetta mundi fara at spæla av.

Men nú hevur sambýlið havt búfólkini búgvandi í góðar fýra mánaðir, og væl hevur eydnast.

Í hesum samband skipaðu starvsfólkini saman við búfólkunum fyri eini hugnaløtu fyri tey avvarðandu. Her varð bjóðað kaffi og køkur, og ein gestarøðari var eisini á skránni.

Her fingu starvsfólkini eisini at vita, at hóast tað kenst undarligt hjá teim avvarðandi, at teirra barn nú er flutt heimanífrá, so eru tey væl nøgd við umstøðurnar á nýggja sambýlinum.

Og hetta fegnast starvsfólkini sjálvandi um.

### Dámar væl trøll

Í løtuni húsast seks búfólk á sambýlinum. Tey hava hvør sína íbúð við egnari stovu, køki, kamari og baðirúmi, og gjalda tey eisini húsaleigu fyri hesa lítlu íbúð teirra.

Eitt av búfólkunum er Maria Olsen frá Árnafirði. Seinasta summar kundi Maria hátíðarhalda 40 ára føðingardag sín, og tað gjørdi hon eisini við buldri og braki.

Skipað var fyri stórari veitslu í Skálanum í Klaksvík, og tey vóru mong í tali, sum ynsktu at heilsa uppá føðingardagsbarnið hendan dagin.

Men hóast Maria nú nærkast teim 41 árunum, so er hetta fyrstu ferð, at hon búleikast uttan foreldur síni.

Hon tekur ímóti mær inni í íbúð hennara. Kaffi og heimabakaðar smákøkur standa á borðinum í hugnaliga køkinum, og Maria situr í rullistólinum og smílist. Klár til at fortelja mær, hvussu tað er at búleikast á einum slíkum staði.

– Mamma hevur bakað okkum smákøkur, sigur hon og peikar á glasskálina, sum stendur á borðinum. Eg seti meg niður og fái mær eina køku. Væl smakkar.

– Mamma er ófør at baka. Hon bakar altíð, so eg kann kann bjóða gestum mínum okkurt gott, greiðir Maria frá.

Á svørtu hornasofuni sita lítil fitt trøll og hyggja at, meðan vit njóta kaffimunnin. Á vindeygakarminum sita eisini lítil trøll og hyggja at okkum, og inni í kamarinum hjá Mariu sita enn fleiri trøll.

Eg spyrji Mariu, hvar hon hevur fingið øll hesi.

– Eg elski trøll, sigur hon og greiðir frá, at fólk ofta keypa henni slík trøll sum eina gávu.

– Eg vil nógv heldur hava trøll enn blomstur og líknandi. Tey eru so fitt og ker, sigur hon, meðan hon vendir sær og hyggur at trøllunum í sofuni.



*Allastaðni í hugnaligu íbúðini liggja smá trøll og fylgja við tí, sum fyrigongst*

### Leingist onkuntíð

Maria prátar nógv, og hon veit onkra søgu at fortelja um hvørt ting, sum hon eigur inni í íbúðini. Hon biður meg hyggja inn í skápini, sum øll eru full av koppum, tallerkum og skálum.

Okkurt er keypt frá Idé-Møblum, og okkurt onkrastaðni í Klaksvík. Ein søga er knýtt at øllum, og eg fái allar søgurnar.

Mamma Mariu er onkursvegna knýtt at øllum søgunum, og ein skilir beinanvegin, at sambandið millum tær báðar er av einum heilt serligum slag.



*Maria er ófør at siga frá, og dámar henni væl at fáa gestir*

– Eg eri so góð við mammu, tí hon er so fitt, tekur Maria ofta til í øllum orðafloyminum.

Hon fortelur eisini, at onkuntíð leingist henni heim aftur til foreldrini.

Heima eigur hon ein svartan frens, sum foreldrini nú ansa, og honum leingist henni eisini eftir.

Sum oftast er Maria heima hjá foreldrunum í vikuskiftunum, og tað dámar henni væl.

Hon heldur, at tað er ein øgiliga stór broyting at flyta heimanífrá fyri fyrstu ferð, men nú byrjar hon so spakuliga at fella til í nýggja heimi hennara.

– Men eg leingist øgiliga illa eftir foreldrunum, og eg veit, at tey sakna meg øgiliga nógv har heima, sigur hon stillisliga.



*Sum 40 ára gomul flutti Maria fyri fyrstu ferð frá foreldrum sínum. Hon er í dag búsitandi í einasta sambýlinum fyri tilkomin menningartarnað í Føroyum*

### Svomið í 25 ár

Maria er ófør at siga frá um lív hennara. Hon er væl skorin fyri tungubandinum, og prátið gongur lystiliga í hugnaligu íbúð hennara.

Hóast hon situr í koyristóli, so hevur hon altíð úr at gera. Hon gongur til bingo og spælir boccia, og hvørt fríggjakvøld situr hon framman skíggjanum og fylgir Gekka-spælinum.

– Men eg klári ikki at seta prikkarnir sjálv, so tað má onkur annar hjálpa mær við, sigur hon og sipar til eyguni, sum ikki síggja so væl.

Afturat øllum hesum svimur hon eisini fimm ferðir um vikuna. Hetta hevur hon gjørt í skjótt 25 ár, og er svimjihøllin nærum vorðin eitt annað heim hjá henni. Hvørt ár, tá Maria hevur føðingardag, sendir hon eina lagkøku oman til starvsfólkini í svimjihøllini.

– Tey eru so fitt, og eru góð við meg. Tí skulu tey eisini hava okkurt gott, sigur hon.

Á sambýlinum verður stórur dentur lagdur á, at búfólkini veruliga skulu kenna sambýlið sum teirra egna heim. Tí hava tey sjálvi innrættað íbúðirnar, og tey eru eisini við til at leggja skránna fyri dagarnar, sum fara framvið.

Hjá Mariu er hetta eingin trupulleiki, tí hon hevur altíð nóg mikið at takast við.

Hvønn dag nýtir hon nakrar tímar á Verkstaðnum á Brekku, og restin av degnum fer til hugna av ymsum slag. Tá hon ikki er úti, spælir hon spøl sum Ludo og Memory við onkrum av búfólkunum, men annars dámar henni eisini væl at ferðast. Har er altíð ferð á hjá henni, og tað hoyrist eisini aftur í prátingarlagnum.

### Spent til Norðoyastevnu

Tað er ikki altíð so lætt at fylgja við, tá Maria fer í gongd við at práta. Hon hevur so nógv at siga frá, og ein fær altíð nógv at vita.

Hon fortelur um túrin til Strendir, sum stendur fyri framman, har hon ætlar sær í ball hjá Javna. Og eisini aðrir túrar fáa okkurt orðið á vegnum. Jú, har er ferð á hjá henni.

Maria hevur sjálvandi fartelefon, og órógvar hon fleiri ferðir prátið hjá okkum hetta kvøldið.

Hon hevur fleiri vinkonur, sum ringja til hennara, og tær práta og skemta sær óført.

Kaffikoppurin er nú við at tømast, og prátið líður mót endanum. Men vit sleppa ikki undan Norðoyastevnuni, sum liggur fyri framman.

– Eg eri so ræðuliga spent, sigur hon. Maria er fyri langari tíð síðan byrjað at telja dagarnar til stevnuna, og leygarkvøldið ætlar hon sær í býin, so hon kann verða við til Midnáttarsamkomuna.

– Tá sleppa vit eisini at verða leingi uppi her í sambýlinum, so eg kann sagtans fara ein túr út, sigur hon spent.

Eisini fýrverkaríið skal upplivast, tí tað, heldur hon, er eitt tað vakrasta, sum finst.

Eg lati meg í aftur jakkan, og takki fyri meg. Eg ivist onga løtu í, at Maria var glað fyri at fáa vitjan, tí á vegnum út biður hon meg um endiliga at koma skjótt aftur.